Fleiri rásir - einki roks

DR2 - mikudagin kl. 20.30

# Malaria

**Hon hevur dripið fleiri fólk, enn nakar annar hevur gjørt. Talan er um deyðiligastu sjúkuna í heiminum. Eina sjúku, sum er eldri enn sjálv menniskjan**

Fimmhundrað milliónir menniskju eru smittað við malaria, og nærum tríggjar milliónir doyggja hvørt ár av sjúkuni. Fyri hvørji 30 sekund doyr eitt barn av malaria, og í hundrað londum kring heimin liva nærum helmingurin av íbúgvunum í støðugum ótta fyri, um tey verða tey næstu, sum verða rakt.

Eftir annan heimsbarda hildu vit vestanfyri, at sjúkan var at kalla útruddað, men nú er hon av álvara á veg framaftur. Tørvandi heilivágur, ferðavinna, skógartýning og sosialir trupulleikar hava lagt trýst á heilsuskipanina í teimum londum, sum eru í vandaøkinum. Malarian er komin aftur til Rusland, til eystara og syðra partin av Europa og eisini til USA. Soleiðis verða nú eini 1.000 amerikanarar og 2.000 bretar hvørt ár smittaðir.

## Var burturbeind

Dokumentar-sendingin, sum er framleidd av BBC, og sum er í tveimum pørtum, sigur søguna um stríðið hjá mannaættini móti malaria. Parasittin, sum ber sjúkuna við sær, hevur ófatuliga góð evni til at umstilla seg, so hvørt sum nýggjur heilivágur kemur fram.

Støðuga arbeiði undir bretsku kolonialiseringini tóktist tó at bera ávøkst, tá sjúkan varð at kalla burturbeind, men tað var tó ikki øll søgan. Samstundis verður nevnliga eisini staðfest, hvussu tað ber til, at sjúkan framvegis finst í Afrika, sum stendur fyri 90% av árligu offrunum. Og kannað verður eftir, hví sjúkan nú aftur er komin til vesturheimin.



*Hagtølini siga, at fyri hvørji 30 sekund doyr eitt barn av malaria*



*Vána heilsustøðan í stórum part av Afrika hevur gjørt tað nærum vónleyst at stríðast móti Malaria*

## Stríðið fyri kopping

Í sendingunum verður millum annað tosað við høvdingin, Peter Kombo, sum stríðist fyri at bjarga teimum sjúku í býnum Klakware, sum liggur í Kisii hálendinum í Kenya. Serliga er tað børn og ung, sum eru í vanda, og Kombo roynir til onga nyttu at fáa hjálp frá lokalu myndugleikunum.

Samstundis roynir Jeffrey Sachs, sum er økonomur í ST, at fáa ríku londini at lata meira í neyðhjálp. Og kanska kann óttin fyri egnari trygd geva ríku londunum seinasta skumpið.

Í hvussu so er stríðist Gary Goode við at týna malaria-moyggjabitar, tá eitt óvæntað álop av sjúkuni brádliga er í Palm Beach California. Og so síggja vit eisini Adrian Hall, professara, sum í tíggju ár hevur roynt at finna fram til eitt koppingarevni, og á vegnum til hetta hevur havt bæði sigrar og tap.

# Kvinnur í Hollywood

TvDanmark - Leygardagin kl. 12.50

*Sharon Stone hevur í fleiri ár verið roknað sum ein av stóru kvinnuligu filmsstjørnunum*





*Og sjálvandi kann ein slík sending ikki gerast, uttan at Marilyn Monroe eisini er partur av henni*

Í dokumentarsendingini, Kvinnur í Hollywood, sleppa hyggjararnir at hitta nakrar av størstu kvinnuligu filmsstjørnunum, sum siga frá, hvussu tað er koma í umskeplaða heimin handan hvíta løriftið. Stór nøvn sum Sharon Stone, Kathleen Turner, Whoopi Goldberg, Sally Field, Glen Close og Kathy Bates siga sína bersøgnu hugsan um nakrar av teimum stóru gjøgnum tíðirnar.

Sýnd verða hópin av bæði nýggjum og eldru klippum frá filmsheiminum, har fokus er sett á konufólk. Marilyn Monroe, Greta Garbo, Ingrid Bergman, Audrey Hepburn, Katharine Hepburn, Grace Kelly, Mae West, Rita Hayworth og Vivien Leigh eru bara nakrar av teimum, sum verða at síggja. Og tosað verður eisini um avbjóðingina at hava leiklutin sum ónda kvinnan. Og leiklutir, sum Fatal Attraction og Postboðið ringir altíð tvær ferðir eru góð dømi um hetta.